# Smoltið á Vágsfirði doyr ikki í hungri

**- Tað er ikki rætt, sum keldan sigur við Sosialin, at smoltið hjá Atlantic Seafarm í Vági ikki fær at eta. Smoltið er væl fyri og í góðum standi, sigur nýggi stjórin í felagnum, Páll Leo**

ALIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Herfyri vendi ein av lesarunum hjá Sosialinum í Vági sær til blaðið og bað okkum kanna, um smoltið hjá Atlantic Seafarm á Vágsfirði yvirhøvur fær nakað at eta.

- Nýggja leiðslan hevur sagt, at alt smoltið skal takast av, nú framtíðin hjá alifyritøkuni liggur í óvissu, men tað kann ikki vera rætt, at smoltið skal doyggja í hungri.

Keldan, sum vendi sær til Sosialin, segði seg hava heft seg við, at smoltið á Vágsfirði hevur ongan góðan.



*- Smoltið á Vágsfirði fær at eta, er væl fyri og líður onga neyð, sigur nýggi stjórin í Atlantic Seafarm, Páll Leo*

### Passar ikki

Sosialurin vendi sær til nýggja stjóran í felagnum, sum herfyri varð umskipað við Páll Leo sum stjóra og Kristiani Andreassen sum nevndarformanni.

Páll Leo sigur seg hava skilt, at alt smoltið á Vágsfirði skal takast av, men hann sigur seg einki vita um, at fiskurin ikki fær at eta.

- Hatta kenni eg einki til, og eg kann bara siga, at tað, sum keldan sigur við blaðið, passar slett ikki.

Stjórin sigur, at smoltið hjá Atlantic Seafarm á Vágsfirði er væl fyri og í góðum standi.

- Eg var sjálvur úti og hugdi eitt kvøld í vikuni, og eg kann bara siga, at smoltið líðir onga neyð, sigur Páll Leo, sum undan stjórasessinum var skrivstovumaður á Suðurfisk.

### Alt takast av

Kristian Andreassen, nevndarformaður, segði við Sosialin í vikuni, at talið av smolti á Vágsfirði liggur millum 700.000 og 1 milljón.

Sum skilst, hevur nýggja leiðslan hjá Atlantic Seafarm avgjørt at taka smoltið av til tess at avmarka tapið hjá felagnum, nú roynt verður at skapa nýtt fíggjarligt grundarlag undir virkseminum.

# Enn ein finalistur í Nósabarnaprix

**Rebekka Rafael Petersen úr Kollafirði vann annað undanumfarið í Nósabarnaprix 2003, sum var í Kollafirði leygarkvøldið**

NÓSABARNAPRIX
*Rúna Sivertsen*

Trettan ára gamla, Rebekka Rafael, vann við sanginum, "Tína dýrd tú ofraði, tá tú komst av hæddini".

- Hon er avgjørt eitt talent, segði James Olsen, tá vit høvdu hann í telefonini sunnukvøldið.

Nummar tvey gjørdist Durita Djurhuus við sanginum, "Stjørnurnar blinka", og nummar trý varð Halla Durhuus við sanginum um Flippuna.

Fyrireikararnir av Nósabarnaprix eru vælnøgdir við luttøkuna leygarkvøldið.

- Tjaldið var fultsett, og hýrurin var góður, siga teir. Tað eru teir báðir, Mark Joensen og James Olsen, ið skipa fyri hesum tiltøkum. Á heimasíðuni, www.barnaprix.fo, siga teir millum annað, at teir við hesum tiltaki kunnu verða við til at lata upp dyr fyri tey børn, sum hava evnir og ynskja at stíga á yrkisliga tónleikaliga pallin.



*Tað var 13 ára gamla, Rebekka Rafael Petersen úr Kollafirði, sum vann annað undanumfarið í Nósabarnaprix í Kollafirði leygarkvøld-ið. Hon hevði uppiborið sigurin, siga fyriskipararnir*

# Meira enn 200 ára gomul kúskel

**- Kúskel ella kúfiskur, sum hon eisini verður rópt, klárar seg væl undir ringum umstøðum og broytir stoffskiftið, um tað gerst neyðugt, sigur Jan Sørensen á Havlívfrøðiligu Royndarstøðini í Kaldbak**

NÁTTÚRA
*Vilmund Jacobsen*

Tá ið Sosialurin var við Biofarinum á Fuglafirði fyri 2-3 vikum síðani, har fólk hjá Havlívfrøðiligu Royndarstøðini í Kaldbak kannaðu botnviðurskiftini á fjørðinum, fingu vit onkra kúskel upp við grabbanum.

Kúfiskur er vanlig skel undir Føroyum, men tað man vera fáur, sum veit, hvussu gomul henda skel verður.



*Kúskel kann etast, eins og kræklingur og øða, men sum skilst, er henda skelin ikki so nógv eftirspurd. Hvørki Jan Sørensen ella Guttormur Djurhuus, sum vóru við Biofarinum hendan dagin, høvdu himprast við at etið kúskel av Fuglafirði*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### 200 ára gomul

Tá ið eg og myndamaðurin vóru komin uppá bryggjuna at standa eftir ein frálíkan túr í besta veðri, tók Jan Sørensen, leiðari á Biofar, eina kúskel upp í hondina.

- Henda skelin livir ógvuliga leingi; hon kann nevniliga gerast meira enn 200 ára gomul, sigur hann.

At tað skula ávísir eginleikar til, at nakað livandi kann gerast so aldrandi, er eyðsæð.

- Kúskel er ógvuliga sterk, helst tann sterkasta á havbotninum, og hon klárar seg undir ringum umstøðum. Gerast liviumstøðurnar vánaligar við lítlari ella ongari føði, broytir hon stoffskiftið, so hon yvirlivir.

Jan sigur, at í Norðsjónum er vanligt at síggja kúskel, sum er meinslað av trolreiðskapi.

- Skelin liggur í sandtilfarinum við ovasta partinum undan og tekur føði til sín.

### Kann etast

Leiðarin á Biofar sigur, at kúfiskur kann etast, eins og kræklingur og øða, men sum skilst, er henda skelin ikki so nógv eftirspurd.

Nú Biofarið kannaði botnviðurskiftini á Fuglafirði fyri dálking, spurdu vit Jan Sørensen og Guttorm Djurhuus, sum eisini var við hendan dagin, um teir høvdu etið kúfisk av Fuglafirði.

Báðir vóru samdir um, at tað høvdu teir gjørt - uttan nakað himpr.

Jan sigur, at kúskel verður umleið 8-10 cm. í tvørmát.

- Er høg fjøra, sært tú eitt nú krækling og øðu fjarða uppi, men kúskel heldur vanliga til eitt sindur longur úti á. Hon finst tó bæði innari og eisini úti á djúpari sjógvi.

Hann vísir á, at eins og vanligt er at brúka krækling og øðu til agn, hevur eisini verið dreggjað eftir kúskel til agn.

### Meldar pass

Spurdur, nær ein kúfiskur, sum verður yvir 200 ára gamal, gerst kynsbúgvin, meldar Jan Sørensen pass.

- Nei, tað veit eg ikki sum er, men tað veit onkur annar.

Sosialurin helt, at tað kundi verið áhugavert at fingið tað við í henda greinastubban, um kúskel nú kanska ikki verður kynsbúgvin, fyrr enn hon er 100 ára gomul, tá ið hon kortini livir í meira enn 200 ár!

Men tað fingu vit so ikki Jan at siga okkum.



# Grannar ilskast um møguliga bygging

**Eigarin av skeytinum, Hanus Olsen, fer í næstum at søkja um byggiloyvi at byggja eigaraíbúðir á økinum við R.C. Effersøesgøtu. Grannar hava sent Tórshavnar Býráð mótmælisskriv um møguliga bygging, men Býráði kann ikki taka nakra støðu so leingi einki byggiloyvi fyriliggur**

BYGGING
*Páll Holm Johannesen*



*Eigarin av stóra økinum við R.C Effersøesgøtu, Hanus Olsen, sigur at í næstum fer hann at søkja um at byggja eigaraíbúðir á økinum. Grannarnir hava sent mótmælisskriv til Tórshavnar Býráð um, at økið heldur átti verið friðað.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tá Tórshavnar Býráð fyri góðum tveimum árum síðan seldi stóra øki, har Thorvald Poulsen helt til í eitt mannaminni, til Hanus Olsen, vóru tað fleiri grannar í økinum, sum ilskaðust um avgerðina hjá býráðnum. Hanus Olsen stendur fyri byggifyritøkuni SH Smíð

Tá ein byggifyritøka keypir eitt øki, áljóðandi góðar 2000 m², er ikki løgið um illgruni er um, at eigarin hevur byggivirksemi í kvittanum. Hóast Hanus Olsen framvegis ikki hevur søkt um byggiloyvi, so hava grannarnar við Egholmstrøð víst sína ónøgd við eina møguliga bygging á økinum. Tey eru á einum máli um, at økið er ov virðismikið at nýta til sethúsabygging. Mett verður, at økið heldur átti verið nýtt sum fríøki.

Grannarnir óttast ov nógva ferðslu, um talan verður um eina sethúsabygging. Hetta fer at darva trivnaðin við R.C Effersøesgøtu, og fer illa um vakra umhvørvið. Økið er vælumtókt hjá børnunum sum spælipláss, og verður byggingin veruleiki fara børnini at missa nógv.

Víst verður eisini á vegurin ikki er grótsettur, og tí ikki ætlaður tungari ferðslu.

Fyrstu ferð mótmælisskriv varð sent býráðnum var í mars mánaði í fjør, og tá vóru boðini, at einki byggiloyvi var innsent, og tí var einki at taka støðu til. Fyri trimum vikum síðan var so enn eitt skriv latið Tórshavnar Býráð. Grannarnar siga seg ynskja skjalainnilit viðvíkjandi eini bygging á matr. nr. 720b, sum er økið, sum Thorvald Poulsen átti.

### Vildi hava økið friðað

Upprunaliga seldi Thorvald Poulsen Tórshavnar Býráði økið við nøkrum treytum. Á skeytinum stendur, at Thorvald skuldi búgva í húsinum til hann andaðist, og at øki skuldi verða fríøkið, so leingi hann livdi.

Tórshavnar Býráð lat í 1987 Thorvaldi 3 milliónir fyri økið. Inntøkurnar av søluni setti Thorvald í Grunn Thorvalds Poulsen av Steinum. Grunnurin skuldi stuðla upp undir útbúgving hjá føroyskum listafólki.

Fólk minnast Thorvald hava eina stóran og vakran urtagarð. Hann arbeiddi sum urtagarðsmaður í eitt mannaminni. Umframt stóru sethúsini, hevði Thorvald eisini trý stór drívhús og eitt gróthús. Røddir hava verið frammi um, at gróthúsið hjá Thorvaldi Poulsen er eitt av heilt fáu sornhúsunum, sum eru eftir at finna í Suðurstreymi, og tí hevur húsið virði sum eitt fornminni.



### Søkir byggiloyvi í næstum

Eigarin av skeytinum, Hanus Olsen, sigur við Sosialin, at hann í næstum fer at søkja um byggiloyvi um at byggja eigaraíbúðir á økinum. Í løtuni liggur í kortunum, at talan verður í alt um 12 eigaraíbúðir.

10 teirra verða eftir ætlan 74 m² hvør, meðan hinar báðar verða eitt vet minni. Hanus hevur áður bygt eigaraíbúðir inni á Gøtu, og seinni í ár verður farið undir bygging á Løgmannabreyt. Hanus Olsen sigur, at um alt gongur eftir ætlan, so verður farið undir byggingina við R.C. Effersøesgøtu eftir arbeiðið á Løgmannabreyt.

Hann hevur hoyrt sum leysatíðindi, at grannarnir í økinum hava sent býráðnum mótmælisskriv um eina møguliga bygging, og í tí viðfangi hevur Hanus bjóðað Tórshavnar Býráð at keypa økið aftur.

– Eg keypti økið við tí fyri eyga at byggja íbúðir, og tað er framvegis ætlanin hjá mær. Eftir, at eg hoyrdi at grannarnir hava sent mótmælisskriv, havi eg bjóðað býráðnum at keypa økið aftur ella, at teir geva mær eitt eins gott øki at byggja íbúðir ístaðin, sigur Hanus Olsen fyri SH Smíð.

Formaðurin byggi- og býarsamskipanarnevndini:

# Gjørdu møguliga ov skjótt av

**Á býráðsfundum hevur verið umrøtt at keypa økið aftur, og gera tað aftur til eitt fríøki, sigur Heðin Mortensen**

BYGGING
*Páll Holm Johannesen*

Formaðurin í byggi- og býarsamskipanarnevndini í Tórshavnar Býráð, Heðin Mortensen, sigur, at hann er fullgreiður yvir, at grannarnir við Egholmstrøð hava víst sína ónøgd við møguliga bygging á vakra økinum við R. C Effersøesgøtu.



*Formaður í byggi- og samskipanarnevndini í Tórshavnar Býráð, Heðin Mortensen, sigur at fleiri býráðslimir seta nú spurnartekin við, um tað var so klókt at selja økið við R.C Effersøesgøtu av fyrstani tíð.*

Málið hevur eisini verið umrøtt á býraðsfundi fleiri ferðir, og nakrar býráðslimir hava sett spurnartekin við, um býráðið ikki gjørdi iv skjótt av, tá øki varð lýst til sølu. Spurdur um hví økið skuldi seljast, svarar Heðin Mortensen, at tað hevur verið ein politisk semja um, at Tórshavnar Býráð ikki skal eiga ov nógv privat ognir, og tí varð økið selt.

Men kortini tykjast fleiri býráðspolitikkarar hava fingið kaldar føtur, og tað ásannar Heðin Mortensen eisini.

– Fleiri av býráðspolitikkarunum ynskja, at býráðið keypir økið aftur, og gevur økinum tann heiður, tað hevur uppiborið. Tosað hevur verið um at friða tað, og fríðka um økið aftur, sigur Heðin Mortensen at enda.